# Vinna og politikkur á kollisiónskós!

**Útgerðarhavnir: Megna oljufeløgini ikki at kombinera eina fakliga niðurstøðu um ta bestu basaloysnina saman við politiska viljanum, so verður tað landsstýrismaðurin, sum í síðstu syftu kemur at gera av, hvar og hvussu útgerðarvirksemið fer at verða í Føroyum**









ANALYSA - ÚTGERÐARVIRKSEMI
*Jan Müller*

Fríggjadagin varð freistin úti hjá fyritøkum og feløgum at lata inn tilfar til prekvalifiseringina í sambandi við komandi oljuútgerðarvirksemi í Føroyum. Sosialurin frættir, at einar seks (møguliga sjey) umsóknir eru latnar Statoil, sum fyristøðufeløgini (operatørarnir) hava kjósað sær at standa fyri hesum uriasposti av eini uppgávu: at velja út ta føroysku havnina og felagið, sum skal hýsa komandi oljuútgerðarvirkseminum.

Tey seks feløgini, sum Sosialurin skilur hava bjóðað seg fram í prekvalifiseringini eru: Asco Føroyar, Eimskip, Skipafelagið, Smyril Line, Atlantic Supply Base og Norserv. Onkur av feløgunum hava so eisini útlendskar samstarvspartnarar.

Seinastu tíðina hava fýra serfrøðingar í netttupp oljubasavirksemi í Noregi og sum standa Statoil nær verið í Føroyum og kannað umstøðurnar á teimum plássum, sum bjóða seg fram at hýsa eini komandi oljuútgerðarhavn. Hesi plássini eru Havnin, Sund, Runavík og Drelnes. Við øðrum orðum er talan um seks ella sjey samtøk ella einstøk feløg, sum hava bjóðað seg fram at taka sær av útgerðarvirkseminum frá teimum fýra havnunum umrøddar eru omanfyri.

Teir fýra serfrøðingarnir í oljuútgerðarvirksemi hjá Statoil sita í hesi løtuni og viðgera tilfarið frá teimum 6-7 fyritøkunum, sum hava sent inn tilfar. Sosialurin skilur, at teir sita í Bergen og gera hetta arbeiðið. Og her er eftir øllum at døma ikki talan um tilvildarlig fólk, men harfafturímóti um fólk, sum hava sera drúgvar royndir at arbeiða við slíkum málum. Tvs. at tey eru sera kvalifiserað reint fakliga at koma við niðurstøðum um eitt nú hvørji øki eru best egnað til útgerðarhavn.

## Tilboð inni 1. januar

Tíðarhorisonturin er tann, at áðrenn 1. januar skulu hesi fólkini hava valt út nakrar av teimum fyritøkunum, sum tey meta fakliga eru best kvalifiserað at geva endaligt boð uppá útgerðarvirksemið. Hóast allir umsøkjararnir eru kvalifiseraðir, so kunnu vit rokna við, at viðgerðararnir ikki fara at taka øll feløgini við til endaligu boðgevingina men fara at velja út kanska einar 2-3 ella 4 av teimum 6-7 fyritøkunum. Rúni Hansen, sum er settur leiðari á føroysku leitideildini hjá Statoil vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til alt málið men hann útihýsir ikki møguleikanum fyri, at fleiri av fyritøkunum verða valdar frá, áðrenn komið verður til endaligu tilboðsgevingina.

Hetta er at sammeta við, at søkt verður eftir fólki til eina fyritøku. Hóast eini 6-7 eru sera vælegnað til uppgávuna, so verða bert eini 3-4 vald út til samrøðu.

Hetta kann merkja, at tá avtornar vera tað kanska onkur av plássunum, ið bjóða seg fram at hýsa útgerðarhavnini, sum als ikki verða við í sjálvari útbjóðingini. Um so er – og tann møguleikin er helst eisini til steðar – at fyritøkan, sum bjóðar seg fram at leggja útgerðarvirksemi í Suðuroynni, ikki sleppur gjøgnum nálareygað í reint fakligu metingini í sjálvari prekvalifiseringini, so merkir tað jú, at Suðuroyggin er »out«. Ella hvat? Stendur ikki í lógini, at útgerðarvirksemi eisini skal verða í útjaðaranum! Og kann útjaðarin verða nakað annað enn Suðuroyggin! Neyvan man nakar ímynda sær Runavík sum útjaðara.

Her eru vinna og myndugleikar ella rættari, her kunnu fakliga útveljingin og lóggávan longu vera á kollisiónskós. Telist t.d. Norserv á Drelnesi fakliga og innihaldsliga ikki millum bestu feløgini í prekvalifiseringini, so er jú ein møguleiki fyri, at tað als ikki verður við í útbjóðingini. Men hvar er tá útjaðarin kundi verið spurt. Ella er tað so, at okkurt av hinum feløgunum, sum vil hava útgerðarhavnina at liggja í t.d. Havn, hevur tikið hædd fyri hesum og hevur roynt at livað upp til lógina við t.d. longu í prekvalifiseringstilfari sínum hevur sagt seg vilja leggja ein part av virkseminum í Suðuroy! Tað er eisini hugsandi. Ella er tað hugsandi, at Norserv á Drelnesi hevur so nógv góð kort á hondini, at eisini endaliga avgerðin fellur á Suðuroynna. Tá hevur í hvussu er Eyðun Elttør ongan trupulleika.

## Hørð kapping

Men neyvan eru allar súðir syftar enn. Talan er jú um stórar og sterkar fyritøkur, sum vilja hava útgerðarvirksemið til Havnar, inn á Sund og til Runavíkar. Tak t.d. eina ta sterkastu fyritøkuna í landinum, Tórshavnar Skipasmiðju, sum hevur fingið sær eina stóra og roynda fyritøku í Skotlandi sum partnara, Asco! Tað verður uttan iva ringt at koma uttan um hetta samtakið sæð frá einum fakligum og fíggjarligum sjónarvinkli., Og vit kunnu taka Atlantic Supply Base í Runavík, sum verður bakkað upp av øllum tí vælsmurda vinnulívinum í Eysturoynni.

Men sum sagt, 1. januar vita vit, hvørji feløgini og harvið møguliga eisini hvørjar havnir sleppa at vera við í endaspurtinum, tvs. tilboðsgevingini. Tríggjar vikur seinni, umleið 1. februar skulu tilboðini verða inni, og umleið 1. mars skulu fyritøðufeløgini við Statoil sum umsitara taka støðu til, hvat felag, hvat samtak fær arbeiðið og harvið hvør ella hvørjar havnir verða ávikavist høvuðsútgerðarhavnin og útjaðara-útgerðarhavnin.

Hetta kann tykjast eitt sindur fløkt – og er tað eisini. Tí vit kunnu koma í eina støðu, har vinnan út frá fakligum kriterium velur eina loysn, sum er ímóti politiska viljanum, lógini, og tað skuldi ikki borið til. Men út frá tí, sum longu hevur verið frammi, so er tað eisini ein sannroynd, at vinnan helst sær at bara ein havn verður at hýsa virkseminum, tí arbeiðið – nú tað bert skulu borast 8 brunnar – er ikki nokk til at verða býtt millum fleiri pláss í landinum.

Tað hevur ljóðað, at um valið fellur á miðsteðarøkið, so kundi ein partur av virkseminum verður lagdur í Suðuroy og her hevur tilbúgvingin verið nevnd. Tvs. útgerð í sambandi við trygd og dálking verður øll at liggja á Drelnesi td. Hetta er í hvussu er nakað, sum okkurt av oljufeløgunum hevur nevnt sum ein møguleika í teirra uppsóknum til leitiloyvi.

## Torført val

Hvat enn fer at henda, so kunnu vit koma út fyri, at fakliga metingin av útgerðarvirkseminum ikki verður sambarilig við politiska andan ella rættari, við lógina. Hóast tað ikki fekst politiskur meiriluti á sinni fyri at leggja alt útgerðarvirksemi við lóg í Suðuroynni, so samtykti tingið kortini, at útgerðarvirksemi eisini skal vera í útjaðaranum. Og her hevur landsstýrismaðurin klárt meldað út, at taka oljufeløgini ikki hetta við, so hava tey ein trupulleika.

Men hvat hendir um niðurstøða teirra kortini verður faklig og einki annað! Tvs. at tey velja at halda seg uttan fyri politiskar avgerðir og bara halda seg til fakligu metingina og leggja upp í hendurnar á landsstýrismanninum, sum jú hevur seinasta orðið, at gera hetta av! Tá hava vit so bara hansara orð at ganga eftir, og tey eru, at hann ætlar at halda seg til lógina. Tvs. at antin fáa tey bóltin aftur ella sker landsstýrismaðurin ígjøgnum. Alternativið til tað er so at leitifeløgini sjálvi peika á ta loysn, sum tey í løtuni kanska halda vera so ómøguliga: at kombinera fakligu metingina-/niðurstøðuna saman við tí politiska ynskinum. Og hetta er jú »sagens kerne«.

Loksins vil onkur spyrja, um ikki útgerðarvirksemi verður so lítið í leitiskeiðnum, at vit eiga ikki at taka endaligu avgerðina um, hvar útgerðarhavnin skal liggja, fyrr enn olja er funnin. Til tað vilja onnur siga, at har virksemið verður lagt longu í dag, har fer tað eisini at verða í framtíðini. Og út frá tí eru komandi vikurnar sera avgerandi og spennandi.



# Aldarinnar brúdleyp í Vági



*Beint eftir vígsluna vóru tey trý brúðarpørini avmyndað frammanfyri altarinum í Vágs Kirkju. Frá vinstru eru tey Heidi og André, Eyðhild og Suni og Anja og Tom Willy. Ytst høgrmegin er Heri Joensen, prestur*

**Ongin veit um størri brudleyp at siga enn tað, sum var í Vági leygardagin, tá ið tríggjar systrar giftust**

BRÚDLEYP
*Áki Bertholdsen*

Tað mundi vera onki minni enn aldarinnar brúdleyp, sum var í Vági leygardagin, tá ið tríggjar systrar høvdu gjørt av at fáa tað skrivligt við menninar sama dag.

Tað vóru tær tríggjar systrarnar Anja, Eyðhild og Heidi Mørk í Vági, sum høvdu gjørt av at halda felagsbrúdleyp.

Ongin Prestur er í Vági. Men Heri Joensen, sum hevur verið prestur í Vági, men nú er í Havn, varð spurdur um hann vildi koma suður at víga pørini, og tað játtaði hann beinanvegin. Hann helt, at tað var stuttligt at vera partur av eini so søguligari løtu í Vágs Kirkju, sum hesari.

Aftaná eina sera hátíðarliga vígslu í eini pyntaðari og fullari kirkju, har Kirkjukórið Ljómur setti ein serligan dám á við tveimum sangum, varð farið vestur í Vágshøll, sum ongantíð hevur verið vakrari pyntað enn tað sama. Á veg úr kirkjuni varð skotið sum á nýggjárinum, bæði við byrsu og við fýrverki.

Í Vágshøll varð borðreitt fyri 620 fólkum við feskari súpan, oksasteik og íslagkøku. Aftaná borðhaldið, sum Torgerð Suðuroy stýrdi, varð dansur næstan til tann ljósa morgun - og tað er leingi hesa árstíðina.

# Flakavirkið í Sørvági liggur stilt

**Einki arbeiði hevur verið á flakavirkinum í Sørvági seinastu vikurnar, meðan arbeitt verður við at fáa frystiorku inn á virkið. Eisini verður arbeitt við at umleggja fíggingina**



FÍGGJARVÁNIR
*Edvard Joensen*

Gólvið á flakavirkinum í Sørvági hevur verið turt seinastu tríggjar-fýra vikurnar. Orsøkin til, at virkið hevur verið stongt, er, at arbeitt verður við at útbyggja frystiorkuna, samstundis sum arbeitt verður við umfígging av felagnum, sum rekur virkið.

Poul Arni Jacobsen, stjóri á Flakavirkium í Sørvági, sigur, at manglandi frystiorkan á virkinum ger tað trupult at arbeiða.

Flakavirkið heldur til í leigaðum hølum á havnarlagnum í Sørvági. Inni á virkinum eru skerilinjur og frystigoymsla. Men útgerð til sjálva frystingina av lidnu vøruni manglar. So sum plátufrystarar, bandfrystarar, skáp ella hvat tað nú kann vera, sum avgjørt verður at seta upp.

Tað ger, sigur Poul Arni Jacobsen, at ikki ber til at arbeiða eitt nú upsa og hýsu, sum fyri tað mesta verða seld fryst. Og saltfiski, sum annars hevur verið høvuðsframleiðslan í heyst, er ikki marknaður fyri beint nú. Jólasølan er liðug, og tann næsta stóra sølan verður ikki aftur fyrr enn til páskar.

Flakavirkið í Sørvági hevur arbeitt nakað av kongafiski, sum mest er keyptur frá trolarunum úr Vágum. Kongafiskurin hevur verið skorin til flak, sum selt er feskt av landinum. Eitt sindur av útróðrarfiski hevur eisini verið at fingið frá útróðrarbátunum í Sørvági, men teir selja eisini um uppboðssøluna hjá Fiskamarknaðinum, og har eru prísirnir høgir.

So høgir, at tað gongur illa hjá flakavirkinum í Sørvági at vera við í kappingini um tann fiskin, skilst.

Fíggjarstøðan er heldur ikki soleiðis, at til ber bara at keypa tosk at salta og leggja á goymslu, sigur Rói Egholm, nevndarformaður í felagnum, sum stendur aftan fyri flakavirkið.

Hann sigur, at meira var at gera við virkið, enn væntað varð, og at tað gjørdist dýrari enn roknað varð við at seta virkið í stand, tá byrjað varð.

Arbeitt verður nú við umfígging, soleiðis at lættari verður at reka virkið, sigur Rói Egholm. Fígging var til at keypa útgerð og seta virkið í stand fyri. Men tað varð, sum sagt, dýrari enn væntað. Sum er verður koyrt upp á kassakredit, og tað ber ikki til í longdini.

Tað er ikki soleiðis, sigur hann, at eginpeningurin er brúktur, og ikki er neyðugt við meira partapeningi heldur.

Men hann viðgongur, at raksturin hevur ikki gingið nóg væl, síðan byrjað varð. Kortini kemur ikki upp á tal at steingja virkið, sigur hann. Steðgurin, sum nú er, er bara fyribils, til ætlaða útbyggingin er komin upp á pláss.

Poul Arni Jacobsen, stjóri á flakavirkinum í Sørvági, sigur, at nú eru jólini og nýggjárið fyri, so har verður einki gjørt nú beinanveg. Men arbeitt veðrur alla tíðina við at finna útgerð, og einaferð inn í januar vónar hann at hava funnið eina loysn, soleiðis at frystarí verður sett upp á virkinum, og tey sleppa aftur til arbeiðis.

Tað er partafelagið Vesturvón, sum eigur bygningin, flakavirkið heldur til í. Og sum skilst á stjóranum á flakavirkinum, eru ætlanir um at leiga størri part av bygninginum, enn tað, virkið heldur til í í dag. Men enn er einki avgjørt tí víðvíkjandi. Teir bíða eftir svari frá Vesturvón.